## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin – Dýra Biðidag:**
Fleyr til gul av vestri ella av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 4 og 7 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Gul til stívt andøvsgul av suðri, seinnapartin upp í ein strúk. Regn av og á og hitin millum 6 og 9 stig.




**Veðrið sunnudagiin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi og ælingur, men onkur sólglotti. Hitin millum 5 og 8 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Mánadagin upp til stívt andøvsgul av útsynningi, seinni lot av ymsum ættum. Ælingur og hitin um 6 stig. Týsdagin veksur hann vindin upp í ein strúk av landnyrðingi og ælingur. Hitin um 4 stig.

# Eyðun Nolsøe í Norðurlandahúsinum

**Eyðun Nolsøe er á konsertferð og leygarkvøldið verður útgávukonsert í Norðurlandahúsinum**



**KONSERT**
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Fyri stuttum gav Eyðun Nolsøe nýggja fløgu út. Í hesum sambandi er hann nú á konsertferð við eini røð av útgávukonsertum. Leygarkvøldið verður stór konsert við legenduni inna føroyskan tónleik, Eyðun Nolsøe, í Norðurlandahúsinum.
Eyðun kom fram í áttatiárunum sum partur av Frændum, ið er ein hin navnframasti bólkurin í Føroyum. Eyðun hevur síðani eisini staðið á egnum beinum og gav fyri 11 árum síðani út fløguna Solo.
Nú er hann aftur. Tað er uppá tíðina, eru tað nógvar røddir ið siga. "So Nógvar Røddir" er eisini heitið á nýggju fløguni hjá Eyðuni. Fløgan er væl móttikin og hevur frá flestu røddum fingið góð ummæli.
Rókur Jákupsson og Dánjal á Neystabø leggja fyri í Norðurlandahúsinum leygarkvøldið, har útgávukonsert er við Eyðuni Nolsøe klokkan 20:00.

**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | -2 |
| Nuuk | -1 |
| Qaqortoq | 1 |
| Ammassalik | 6 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 11 |
| Seyðisfjørður | 9 |
| Tórshavn | 8 |
| Lerwick | 10 |
| Aberdeen | 11 |
| London | 19 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 14 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 10 |
| Keypmannah. | 17 |
| Helsinki | 5 |
| Moskva | 2 |
| Berlin | 25 |
| Warzawa | 21 |
| Kiev | 12 |
| Bukarest | 21 |
| Paris | 25 |
| Madrid | 18 |
| Róm | 21 |
| Malorca | 18 |
| Athen | 21 |
| Malta | 19 |
| Tunis | 22 |
| Beijing | 29 |
| New Dehli | 38 |
| Bangkok | 34 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 23 |
| New York | 21 |
| Miami | 27 |
| Los Angeles | 20 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | -- |
| La Paz | 11 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 19 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt hátrýst, 1027 hPa. sunnan fyri Ísland fer eystureftir og viknar nakað. Ein kuldabrúgv vestan fyri Føroyar fer eystureftir.




**Í dag:**
Hátrýstið sunnan fyri Føroyar fer spakuliga eystureftir og viknar. Lágtrýstið í landsynning úr Hvarvinum fer í landnyrðing og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum leygardagin.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 28/4 kl. 06[00] – 29/4. 06[00]. Hitin í gjár: 7,7°
Minsti hiti máldur í apríl: -9,9° - Mesti hiti máldur í apríl: 18,3°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 8,0 mm – mált frá 21/4 kl. 06[00]– 22/4 kl. 06[00]
Avfallið higartil í apríl: 133,0 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

24. apríl – Fyrra kvarter
30. apríl – Mánin longst frá jørðini
2. mai – Fullmáni

Kelda. Álmanakkin 2007

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 2. Mai | 07.23 | 19.43 | 06.23 | 18.43 | 06.38 | 18.58 | 09.23 | 21.43 | 10.23 | 22.43 | 05.38 | 17.58 | 04.38 | 16.58 | 07.38 | 19.58 | 08.38 | 20.58 | 07.08 | 19.28 | 08.23 | 20.43 |
| 3. Mai | 08.04 | 20.26 | 07.04 | 19.26 | 07.19 | 19.41 | 10.04 | 22.26 | 11.04 | 23.26 | 06.19 | 18.41 | 05.19 | 17.41 | 08.19 | 20.41 | 09.19 | 21.41 | 07.49 | 20.11 | 09.04 | 21.26 |
| 4. Mai | 08.49 | 21.12 | 07.49 | 20.12 | 08.04 | 20.27 | 10.49 | 23.12 | 11.49 | - | 07.04 | 19.27 | 06.04 | 18.27 | 09.04 | 21.27 | 10.04 | 22.27 | 08.34 | 20.57 | 09.49 | 22.12 |
| 5. Mai | 09.36 | 22.00 | 08.36 | 21.00 | 08.51 | 21.15 | 11.36 | - | 00.12 | 12.36 | 07.51 | 20.15 | 06.51 | 19.15 | 09.51 | 22.15 | 10.51 | 23.15 | 09.21 | 21.45 | 10.36 | 23.00 |
| 6. Mai | 10.25 | 22.49 | 09.25 | 21.49 | 09.40 | 22.04 | 00.00 | 12.25 | 01.00 | 13.25 | 08.40 | 21.04 | 07.40 | 20.04 | 10.40 | 23.04 | 11.40 | - | 10.10 | 22.34 | 11.25 | 23.49 |

Tiltøk í Miðlahúsinum í apríl



- altíð eitt tiltak miðlahúsinum

2. mai
Altjóða skrivstovan
Fólkaupplýsing – kl 19.30

5. mai
Javni
Downs syndrom – kl. 9

9. mai
Føroya Astma og Allergifelag – kl. 18.30

19. mai
Aglow